# Accessories frá Sisters

Systrarnar Gurli Pattinson og Randi Lamhauge Hansen byrjaðu tann 8. september 2007 við einum sokallaðum accessories handli í Saltangará. Hugskotið til at opna ein tílíkan handil fingu tær, tá tær vóru á ferð uttanlands, og kundu tær hugsa sær, sjálvar at opna ein í Føroyum. Í fjør bleiv hugskot systranna til veruleika, tá tær høvdu megnað at funnið eitt passandi høli. Hølið er á Heiðavegi 51 í Saltangará, og er tað beint omanvert Café Bedura. Í Sisters er alskyns príðislutir og smúkkur at fáa til keyps, og higartil hava tær lagt seg eftir at selja einamest til konufólk frá á leið 14 ár og uppeftir. Miðað verður eftir, at tær innan longi, eisini hava príðislutir av ymiskum slagi, til børn og mannfólk. Sum nú er, er alt frá oyraringum og øðrum smúkkum, til hondtaskur og turrikløð at fáa í hesum nýggja handli, ið er væl vitjaður






















